Almanna- og heilsumálaráðið

Dagfesting:	02.12.2025
Mál nr.:	25/20844-33
Ummælistíð:	NA
Eftirkannað:	02. desember 2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum og til gerðarrættarmál.
Stk. 2. Útreiðslurnar sambært stk. 1 kunnu í mesta lagi verða 33,8 mió. kr. harav 1 mió. kr. til gerðarrættarmál.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2029.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Nýggi bygningurin til Landssjúkrahúsið nevndur H-bygningurin er nærum liðugur. Talan er um nýggjan meginbygning til psykiatri, medisinska seingjadeild, føðideild, barnadeild, høvuðskøk og endurvenjing. H-bygningurin á Landssjúkrahúsinum er umleið 15.000 fermetrar og rúmini fleiri enn 500 í tali. Bygningurin er í høvuðsheitum liðugur, og umleið 60 prosent av H-bygninginum er tikin í nýtslu. Tað eru staðfestir lekar í H-bygninginum, og er tað ein av høvuðsorsøkunum til, at alt virksemið ikki er flutt inn. Vavið av lekum er stórt og eftir, at Landsverk hevur latið eina sýnsfrágreiðing gera, er greitt, at tað verður neyðugt at umvæla ella skifta vindeygu, skifta út hurðar umframt annað arbeiði fyri, at bygningurin gerst tættur, og verður egnaður til endamálið. Harumframt er talan um nakrar avleiddar skaðar, ið eisini skulu umvælast.

Tað hevur skund at fáa H-bygningin lidnan. Tí verður nýggj verklagslóg gjørd at fáa heimild til at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum. Samlaði kostnaðurin av ábótum, umvælingum og gerðarrættarmáli er mettur at vera tilsamans 33,8 mió. kr.

Málslýsing
Óheft metingarfólk gjørdi sýn og meting av H-bygninginum í apríl 2025. Sýnsfrágreiðingin varð latin Landsverki í juni 2025. Orsøkin til trupulleikarnar við lekum er samansett og stavar sambært sýnsfrágreiðingini frá vantandi dygd í handverkinum, ónøktandi tilfarsvali, vantandi eftirliti og prosjekteringsfeilum. Tað vil siga, at tað snýr seg bæði um ábyrgd hjá stórarbeiðstakaranum fyri fasaduna og hjá høvuðsráðgevanum, serliga í sambandi við fakeftirlit.

Farið er undir at fremja nakrar ábøtur og er ætlanin annars, at arbeiðini verða gjørd so skjótt sum gjørligt. Enn ber ikki til at siga, hvussu leingi tíðarskeiðið fer at vara, men tað verður helst stóran part av árinum 2026.

Landsverk hevur við støði í sýnsfrágreiðingini sett seg í samband við partarnar í málinum fyri at frætta, hvørja støðu teir hava til sýn- og metingfrágreiðingina, og um partarnir hava í hyggju at umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar, sum eru staðfestir í sýnsfrágreiðingini. Eingin ábending er higartil komin um, at teir vilja umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar.

Við støði í sýnsfrágreiðingini og kanningum, sum Landsverk saman við Landssjúkrahúsinum hava sett í verk, hevur ráðgevi gjørt kanningar og er komin við dagførdari kostnaðarmeting av at bøta og umvæla lekarnar á klimaskerminum og umvæla fylgiskaðar. Sambært tíðarætlanini hjá ráðgevanum verður mett, at alt arbeiðið verður liðugt á heysti í 2026.

Landsverk ætlar at leggja gerðarrættarmál ímóti stórarbeiðstakaranum og høvuðsráðgevanum, tí partarnir ikki hava tikið stig til at umvæla og bøta aftur feilirnar og manglarnar. Í hesum sambandi eru arbeiðstøku- og ráðgevaratryggingarnar, ið eru teknaðar í verkætlanini, eisini viðkomandi. Endalig støða um ábyrgd og endurgjaldskrøv verður tikin í sambandi við gerðarrættarúrskurðin. Hetta er eisini galdandi fyri viðgerðina í mun til teknaðu tryggingarnar og tilgongdina annars við verkætlanini. Nær ein væntandi gerðarrættarsak verður liðug, er torført at meta um, men tað kann helst gerast talan um ár, um tað ikki eydnast at gera semju.

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er gjørt fyri at kunna gera avtalur um neyðugar ábøtur og umvælingar, so restin av H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum kann verða tikin í nýtslu. Harumframt játtan til gerðarrættarmál.

1.2. Galdandi lóggáva

H-bygningurin er knýttur at fleiri galdandi og áður galdandi verklagslógum. Tær eru hesar:

Løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, við seinni broytingum. (Fer úr gildi 1. januar 2027)

Løgtingslóg nr. 64 frá 5. mai 2021 um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð. (Fór úr gildi 31. desember 2024)

Løgtingslóg nr. 82 frá 16. mai 2022 um at innrætta víðkaða partin av kjallaranum í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum til parkering, goymslu og reingerð, umframt til goymslutorn og vegleiðing í H-bygninginum. (Fer úr gildi 1. januar 2027)

Løgtingslóg nr. 134 frá 8. desember 2023 um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan. (Fer úr gildi 1. januar 2027)

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum, umframt játtan til gerðarrættarmál. Talan er um at fáa restina av bygninginum tiknan í nýtslu sum skjótast.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at avtalur verður gjørdar um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið er gjørt í samstarvi við Landssjúkrahúsið, Landsverk og Fíggjarmálaráðið.

Lógaruppskotið er ikki lagt fram til almenna hoyring.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eftir at lekar vóru staðfesetir í H-bygninginum varð ein kanning gjørd av óheftum sýnsmanni, ið metti, at kostnaðurin var 14,5 mió. kr. at umvæla manglarnar, tó so at eyka umfar av spurningum er ávegis í mun til sýnsfrágreiðingina. Síðani er nýggj meting gjørd, og er kostnaðurin nú mettur at verða 32,8 mió. kr. Tá eru 2,5 mió. kr. íroknaðar, ið svara til tað arbeiðið, ið er og verður gjørt fyri at avmarka skaðar, ímeðan hetta mál er í viðgerð.

Í uppskotinum til løgtingslóg fyri fíggjarárið 2026 (LM 15/2025) verður biðið um 15 mió. kr. til at umvæla klimaskerm v.m. í H-bygninginum og til gerðarrættarmál. Síðani er ein kostnaðarmeting gjørd fyri at gera ábøtur á og at skifta vindeygu í H-bygninginum, umframt at skifta úthurðar, sum vísir ein kostnað á 32,8 mió. kr. Harumframt verður roknað við 1 mió. kr. í sambandi við gerðarrættarmál. Tí er í broytingaruppskoti til fíggjarlógina fyri 2026 biðið um 18,8 mió. kr. afturat teimum 15 mió. kr., sum vóru í tí upprunaliga fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026. Tilsamans 33,8 mió. kr.

Fíggjarligu avleiðingarnar eru:

	2026
Ábøtur og umvæling	32.800 kr.
Gerðarrættarmál og sakarmálskostnaður	1.000 kr.
Tilsamans	33.800 kr.

Tølini eru í tús. kr.

Ætlanin er, at útreiðslur til allar ábøtur og umvælingar verða hildnar í 2026.

Tað eru aðrar verklagslógir, ið fevna um verkætlanir knýttar at H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum. Við hesum lógaruppskoti verður biðið um at fáa heimild at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum, so allur bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

Niðanfyri er fíggjarprofilur fyri allar verkætlanirnar, undantikið kostnaðurin til gerðarrættarmálið.

A	B		C	D																		
Nr.	Evni		Verandi játtan	Nýggj játtan	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025	2026
1	B-Bygningurin	(liðugt)	60,5																			
2	Røntgen	(liðugt)	24,4																			
3	Vaskarlið	(liðugt)	21,6																			
4	Svimjihylur	(liðugt)	1,2																			
5	H-bygningurin		686,7	30,3	3,1	1,1	0,8	3,9	4,4	6,6	20,0	16,7	70,8	88,7	111,3	128,2	134,2	31,1	23,5	20,2	24,7	30,3
6	Ymiskt viðlíkahald		59,3		0,0	3,2	1,6	0,9	3,5	5,2	2,6	4,5	5,2	5,7	4,0	3,0	4,8	2,0	2,0	6,0	5,2	
7	DAS		13,5	0,4												0,6	7,1	3,4	1,9	0,1	0,0	0,4
8	Samanbygging		42,8														3,6	23,6	11,4	2,5	1,8	
9	Way-finding		3,9															0,3	2,0	0,2	1,5	
10	kjallaranum)		63,1															4,7	17,2	32,2	9,0	
11	Isolatiónsstovur		16,0	2,1																2,8	11,1	2,1
12	Eygnadeild		14,3																		14,3	
	Íalt		1.007,3	32,8	3,1	4,3	2,4	4,8	7,9	11,8	22,6	21,2	76,0	94,4	115,3	131,8	149,6	65,0	58,0	64,0	67,6	32,8

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan, Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Eingin markaforðing er á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur landsstýriskvinnuni heimild til at gera avtalur fyri í alt 33,8 mió. kr. fyri at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum. Uppskotið leggur ikki heimildir til ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið gevur ikki heimild til at viðgera persónupplýsingar.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í lógargreinini verður heimilað landsstýriskvinnuni at gera avtalur um at gera ábøtur og umvælingar á H-bygningin á Landssjúkrahúsinum fyri í mesta lagi 33,8 mió. kr. Harav er 1 mió. kr. til gerðarrættarmál í sambandi við H-bygningin.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Mælt er til, at verklagslógir galda 2 ár eftir mettu byggitíðina. Henda verkætlan er mett at verða liðug í 2026, og verður gildistíðin fyri verklagslógina tí ásett til 1. januar 2029.

Almanna- og heilsumálaráðið, 2. desember 2025

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Kostnaðarmeting